# Starvslýsing: námsfrøðingur til Barnalund í Fuglafirði

**Søkt verður eftir:**

- **Námsfrøðingi** til vøggustovu at arbeiða 35 tímar um vikuna.
- Starvið verður sett 13. mars ella eftir nærri avtalu.
- Um eingin námsfrøðingur søkir, kann hjálparfólk verða sett í tíðaravmarkað starv.

**Hvørji eru vit:**

- Barnalund, er ein samansjóðaður dagstovnur ætlaður 60 børnum í aldrinum 0-6 ár. Stovnurin er skipaður í tvær lonir,- við tveimum stovum í hvørjum húsi. Ein felagsgongd/-høll, við fjølbroyttum virksemismøguleikum, bindur lonirnar saman. Uttanumøkið hjá stovninum er stórt og endurspeglar í stóran mun uppruna lendið og bjóðar inn til ymiskar avbjóðingar. Meira kunning um stovnin og námsætlan finnur tú á: www.fuglafjordur.fo/borgari/born-og-ung/dagstovnar/barnalund/

**Vit sóknast eftir starvsfólki:**

- ið hevur umsorgan fyri børnunum
- ið ynskir at vera við í menningini av námsfrøðiliga arbeiðinum á stovninum saman við starvsfólkahópinum
- ið bæði kann arbeiða sjálvstøðugt og í toymi
- ið samskiftir týðiligt og leggur dent á gott samstarv
- ið hevur arbeiðsroyndir, sum kunnu nýtast í dagliga arbeiðinum.
- ið er eldhugað og konstruktivt
- ið sær møguleikar fram um avmarkingar

**Vit kunnu bjóða tær:**

- eitt áhugavert og avbjóðandi starv
- fjølbroyttar arbeiðsuppgávur
- eitt starv, har tú kanst nýta tínar dygdir, hava ávirkan og samstundis menna teg sjálvan
- sparring við aðrar námsfrøðingar í toymi

**Setanartreytir:**

Løn eftir sáttmála millum Føroya Pedagogfelag og Fíggjarmálaráðið og Kommunala Arbeiðsgevarafelagið. Fyri at verða settur í starv, skal umsøkjari hava reina barnaváttan.

**Meira fæst at vita um starvið:**
Vilt tú vita meira um stovnin og starvið, kanst tú seta teg í samband við leiðaran í Barnalund Hannu I. Hansen á tlf. 238031.

**Umsókn:**
Umsókn saman við prógvi og møguligum viðmæli/-um skal sendast til:

Fuglafjarðar Kommunu
Í støð 5,
530 Fuglafjørður

ella umvegis teldupost á info@fuglafjordur.fo. **Umsóknarfreistin er mánadagin 6. mars 2023**.